# Hvar blivu hugsjónirnar av, harra John Johannessen?

**HEÐIN JØRGENSEN**
Sørvágur

Harra John Johannessen hevur nú gjørt seg til høvuðstalsmann at steðga best møguliga úrslitinum av eini útbygging av Vága floghavn. Hóast flokkur hansara hevur virkað fyri, at peningur er tøkur til nógv tiltrongda útbygging av afturúrsiglda og forsømda tjóðarflogvølli okkara, áltjóða flogvøllinum í Vágum, setir hesin sjálvútnevndi »politiski formaður« Javnaðarfloksins seg í móti sínum egna flokki. Argumentið hevur hann kopierað frá forsprákarum í Havnar Frambursfelag, sum er lokalfelag Fólkafloksins í Havn.

Hvat vil hesin sonevndi »politiski formaður« Javnaðarfloksins, sum nú saman við Rás2, Sosialinum og fólkafloksmonnunum í Havn seta øll segl at steðga best møguligu útbyggingini av flogvallarviðurskiftunum í Føroyum fyri lítlar pengar?

John Johannessen hevur áður tikið undir við at útbyggja Vága Floghavn við 365 mill. Men nú serkunleikin mælir til at byggja út fyri 47 mill. aftrat, kann hann ikki taka undir við hesum orsakað av eini vindmáting á Glyvursnesi, ið verður liðug til várs. Hevur John Johannessen hugsað um, at henda upphædd bert er ein brøkpartur av, hvat flogvallaætlanin á Glyvursnesi kemur at kosta?

Hvussu hongur roknistykkið saman, tá ein heldur enn at nýta 47 mill. fyri at fáa bestu/bíligastu loysnina, heldur vil nýta smáar tvær milliardir (helst ov lágt mett) av skattaborgarans peningi til ein »supervøll« á Glyvursnesi?

Vit kenna avmarkingar sum eru í Vágum. Men tað, sum átti at verið ein fyrimunur, er nú vorðið ein forðing. Onki vita vit um, hvørjar avmarkingar eru á Glyvursnesi. Tað vita vit fyrst eftir, at vit hava brúkt milliardir og roynt okkum har í nøkur ár.

Í besta føri kann ein flogvøllur á Glyvursnesi blíva eitt sindur betri enn tann í Vágum. Men um vit nýta annars væl dámda fólkafloksútrykkið »cost benefit« skal ikki stórt matematiskt skil til at rokna út, at sera mong ár skulu til at rinda kostnaðin fyri fáu túrarnar, ið vit bara kanska fáa avgreitt fleiri, um super milliardavøllurin á Glyvursnesi í allar hepnasta føri kann liva upp til.

Siðvenja hevur verið í Føroya Javnaðarflokki, at hann politiskt stendur saman sum ein flokkur. Men soleiðis er ikki longur. Nú fara fleiri í sjálvdrátt fyri at tryggja sær sessin minst eitt valskeið aftrat, og so verður handlað hareftir. Flokkur og skil verður sett til viks, og populisman sett í hásæti. Soleiðis hóreiggja summir tinglimir sær í øllum førum.

Harra John Johannessen. Tú sum fyrr var talsmaður fyri skúlum, spælistøðum og øðrum og bleytum virðum, hvussu nógvar skúlar, spælistøð, ellisheim og barsilskrónur (til pápar) kunnu vit ikki fáa fyri kostnaðin at teimum fáu túrunum, ið bara kanska fáast fyri milliardirnar, ið tú og aðrir ætla at leggja út á Glyvursnes? Dugir tú ikki sjálvur at rokna, kann eg hjálpa tær eitt sindur. Fyri tvær milliardir kunnu vit fáa fimm av ætlaðu miðnámisskúlunum í Havn. Men tað ber sjálvandi eisini til at nýta peningin til at røkka øðrum endamálum, ið tú gjørdi teg til forsprákara fyri, tá vit hildu teg vera javnaðarmann.

Eitt er, at tinglimur hámetir egin áhugamál fram um floksins. Men tá hugsjónirnar mugu lúta, átti at verið ovboðið! Ella hevði John Johannessen heldur ongar hugsjónir? Hvat meinti hann við, tá hann í valstríðnum gjørdi seg til forsprákara hjá ungdómi okkara. Tá hann hann lovaði skúlar og spælistøð á hvørjum tanga. Tá hann lovaði best hugsandi umstøður í sambandi við bansburð og útnevndi seg sjálvan til verja pápanna.

Hvat ætla John Johannessen og hansara samansvornu at gera við Vága floghavn, tá snórurin til dreymalandið »Altjóða flogvøllin á Glyvursnesi« verður kliptur? Vænta teir, at teir (við lýsing við avsláttri í Sosialinum) kunnu seta Vága Floghavn til sølu og soleiðis fáa tær 365 milliónirnar aftur?

# Hvørjar ætlanir hevur Klaksvíkar kommuna við Mentanarhúsinum Atlantis?

Neyðugt er, at kommunan tekur støðu. Men hvussu hevur gongdin verið?

Nú nýggja stýrið í Mentanarhúsinum Atlantis, hevur lagt frá sær, meta undirritaðu, fyrrverandi limir í stýrinum, at hetta fer at geva Klaksvíkar kommunu stórar trupulleikar, tí nú noyðist kommunan endaliga at taka støðu til, hvørjar ætlanir hon hevur við Atlantis. Ásannast má, at ikki ber til at reka húsið víðari eftir verandi umstøðum. Stóri spurningurin er, um kommunan yvirhøvur er før fyri at finna eina loysn, tí søguliga sæð hevur gingið illa.

Á vári 2001 vórðu stig tikin, av Klaksvíkar kommunu, at umskipa bygnaðin fyri ognina Atlantis, ogn hjá Klaksvíkar kommunu. Húsini vóru sett í stand og rikin av Klaksvíkar Sjónleikarafelag, men Klaksvíkar Sjónleikarafelag megnaði ikki uppgávuna. Tá varð avgjørt at seta á stovn "Grunnin Mentanarhúsið Atlantis" við heimstaði í Bøgøtu í Klaksvíkar kommunu, handa ognina matr. nr. 672 til grunnin, samstundis sum grunnurin átók sær skyldurnar, sum Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevði yvirfyri Norðoya Sparikassa í sambandi við umbyggingina, sum í høvuðsheitum varð gjørd frá 1995 til 1997.

Sambært viðtøkum stovnsins, ið eru gjørdar av Klaksvíkar kommunu, er grunnurin ein sjálvsognarstovnur, ið verður umsitin av einum stýri við 3 limum, valdir av Klaksvíkar kommunu. Endamálið við grunninum er at vera karmur um mentanarlig virksemi í býnum, t.e. gjøgnum sjónleik, filmsfyrivísan, kvøldsetur, upplestur, sang og tónleik, fundir og annað fyri slík hús líknandi virksemi, og kunnu bólkar, einstaklingar og feløg gera nyttu av húsinum.

Fyrsta stýrið varð mannað av Nikolinu Olsen, Súsonnu Olsen og Jógvani Ravnsfjall. Heidi Vágsá og Fróði Løksagarð hava somuleiðis verið limir í stýrinum í styttri tíðarskeið.

Stýrið legði út við at dagføra húsið innan. Húsið varð ruddað og vaskað, og farið varð beinanvegin í gongd við at gera bygnaðin fyri stovnin. Avtala varð gjørd m.a. við Norðurlandahúsið um samstarv, og í samstarvi við Havnar Bio varð biografur settur á stovn 15. desember 2001.

Tað fyrsta hálva árið varð alt arbeiðið í húsinum gjørt av stýrinum sjálvum, men tá hetta framhaldandi ikki lat seg gera, gjørdu vit av at seta dagligan leiðara.

Í tíðarskeiðnum frá 15. nov. 2001 til 1. mars 2004 vórðu ymsar royndir gjørdar viðvíkjandi dagligum leiðara. Roynt varð at hava leiðara fulla tíð, og tá hetta vísti seg at vera trupult fíggjarliga, varð leiðarin settur niður í hálva tíð. Seinni varð eisini roynt at reka húsið við ongum leiðara, men aftur her máttu vit ásanna, at hetta als ikki bar til. Hesar royndir hava lært okkum, at tað er alneyðugt, at húsið hevur ein dagligan leiðara í fullum starvi. Núverandi leiðarin varð settur í starv tann 1. mars 2004.

Av tí at stovnurin framvegis hevur eitt stórt lán, ið stavar frá umbygginigini hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag í 1990'unum, at dragast við, fer stórur partur av stuðlinum frá Klaksvíkar kommunu til rentur og avdrøg hvønn mánað. Húsið hevur eisini aðrar fastar útreiðslur, og haraftrat er avmarkað, hvussu stórar inntøkur ein mentanarstovnur hevur.

Tað hevur verið trupult at rikið Mentanarhúsið Atlantis. Øll hesi árini hava vit ferð eftir ferð heitt á kommununa um at nýta Mentanarhúsið Atlantis til tiltøk, ið kommunan skipar fyri, men aloftast hava onnur høli í býnum verið nýtt. Heldur ikki hevur mentanarleiðarin hjá Klaksvíkar kommunu víst húsinum áhuga, og hetta hevur undrað okkum øll hesi ár.

Tá nýggja býráðið í vár í fjølmiðlunum boðaði frá, at kommunan skuldi spara, bóðu vit beinanvegin um fund við borgarstjóran. Okkum varð sagt, at í samband við endurskoðaðu fíggjarætlanina hjá Klaksvíkar kommunu fyri 2009 fóru sparingar at vera á ymiskum økjum. Á fundinum kom fram, at borgarstjórin onki kundi ella vildi siga okkum um ætlaðu sparingarnar, men at hetta fór at verða kunngjørt á almennum býráðsfundi 29. apríl 2009. Gjørt varð borgarstjóranum greitt, at Atlantis onki kundi spara her og nú, men at ein og hvør sparing fór at gera, at húsið mátti steingja. Tá hevði gamla býráðið longu skert stuðulin við kr. 50.000,-.

Tá so býráðsmeirilutin á býráðsfundi tann 29. apríl 2009 kortini samtykti at skerja játtanina fyri 2009 við kr. 100.000 aftrat, var okkum greitt, at húsið framhaldandi ikki kundi rekast.

Sama kvøld skrivar Norðlýsið, eftir at hava tosað við forkvinnuna í stýrinum, at Atlantis fer at steingja, tí at stovnurin ikki kann liva við so stórari skerjing í stuðlinum.

Dagin eftir, hósdagin 30. apríl eftir døgurða, verður forkvinnan í stýrinum ringd upp av mentanarleiðaranum hjá Klaksvíkar kommunu. Hann segði, at vit ikki skuldu leypa framav og taka nakrar drastiskar avgerðir, men at hann og borgarstjórin ynsktu at tosa við okkum beinanvegin. Tá hetta ikki læt seg gera, eingin stýrislimur var í Klaksvík henda dag, skuldu vit fáa fundarboð sama kvøld. Men tíverri hoyrdu vit onki aftur frá mentanarleiðaranum.

Seint sama kvøld varð einmælt samtykt at siga okkum frá sum stýrislimir frá 1. mai 2009, og skriv varð handað kommununi tíðliga næsta morgun.

Eitt nýtt stýri varð valt við dugnaligum fólki, men vit kunnu staðfesta, at tey heldur ikki hava megnað at rikið húsið eftir fíggjarligu kørmum býráðsins.

Gongdin í hesum máli vísir greitt, at Klaksvíkar kommuna ikki megnar at fylgja egnum samtyktum, samanberandi viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin Atlantis. Tí er spurningurin: vil kommunan annaðhvørt broyta sínar samtyktir, ella vil kommunan veita húsinum neyðugan stuðul fyri at reka tað? Ella vil kommunan steingja Atlantis?

*Fyrrverandi limir í stýrinum fyri Mentanarhúsið Atlantis*

**Nikolina Olsen**
**Súsanna Olsen**
**Fróði Løksagarð**

# If it ain't broken, don't fix it!

**UNI REINERT DEBESS**



**Hvør skal so spæla tónleik fyri okkum? spurdi ein genta í sjeynda flokki, tá ið tað gekk upp fyri henni, at tónleikabreyt ikki verður á Komunuskúlanum komandi ár!**

Vit hava á Kommunuskúlanum eitt tónleikatilboð til ungdómin, sum fungerar væl. Fleiri av bólkunum og tónleikarunum, sum í dag teljast millum okkara fremstu, hava sín uppruna í tónleikastovuni á Kommunuskúlanum.

Fyrimunurin við at hava breytir á fleiri skúlum er m. a., at næmingarnir sleppa at fara út á skúlarnar og spæla konsertir fyri hvørjum øðrum, og tað er jú spennandi at fara á konsertferð!

Og eisini er tað spennandi at hitta hvønn annan til eitt serligt høvi.

Tað er altíð gott at hava onkran at síggja upp til – hevur man eina tónleikabreyt á hvørjum skúla, eggjar man teimum yngru til at byrja at spæla og ikki minst halda áfram. Tað ger, at tey yngri fara eisini at gleða seg til at fara í 10inda flokk!

Eitt avtrat við at hava tónleikabreytir á hvørjum skúla er, at man kann hava fleiri konsertir ígjøgnum árið, enn man vildi, um allar breytirnar vóru savnaðar á einum stað. Tað er skjótt at stilla instrumentini upp og spæla tildømis í framhaldi av morgunsanginum, og eftir hettar kann mann náa at hava undirvísing víðari tann sama dagin.

Man sær tað aftur í londunum rundan um okkum, at jú størri tingini verða gjørd, minni persónlig blíva tey, og ger man tingini ov stór er lættari at missa intensitetin. Í tónleiki og sum í øllum ørðum er tað umráðandi at halda spenningin og gleðina koyrandi!